## Fólk frá sjúklingahotellinum vitjaðu Høgna

Fríggjadagin vitja 15 sjúklingar og avvarðandi frá Sjúklingahotellinum Tórshavn á Christiansborg Slotti. Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, vísti teimum runt á borgini, eins og hann hevur gjørt áður.



# avtaka statskirkjuna



*Bjørk K. Olsen og restin av HUXA vil hava fólkakirkjuna burtur av fíggjarlógini. Tað heldur Jógvan Fríðriksson, bispur ikki, og mælir heldur til, at allar samkomur fáa eitt sindur av peningi frá statinum*
*Tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen*

riksson, bispur.

– Tað er ikki nakað gott hugskot at geva samkomunum meiri pening. Tær eru sterkar, og hallið á fíggjarlógini er stórt, sigur forkvinnan í HUXA.

Hon viðgongur tó, at tað kann sýnast bíligt, at brúka í mesta lagi tvær milliónir av 800 til at verja sína hugsan, men sigur, at 10 milliónir eru at spara, um kirkjan ongan pening fær.

80 prosent av Føroya fólki er limur í fólkakirkjuni, og tí kundi tað sambært bispi verið passandi at lata eina tvær milliónir krónur í stuðli til hinar kirkjurnar, meðan fólkakirkjan heldur fast við sínar umleið 10 milliónir krónur.

Í dag byggir fíggjarlógin hjá kirkjuni á 47,9 milliónir krónur við øllum. Tað vil siga, at millum ein fjórðingur og ein fimtingur eisini verður goldin av fólki, sum ikki rinda kirkjuskatt.

### Broytingar við skili

Bispur metir tó, at skulu broytingar gerast, so mugu fólk hugsa seg væl um, áðrenn broytingarnar verða gjørdar.

– Tað er útmerkað, at ungu fólkini hugsa, men skal mann gera broytingar, skal mann kanna málið væl áðrenn. Føroyar eru eitt samfelag við einum pakka. Harímillum er tað andaliga, sigur bispur.

## Fá lond privatar kirkjur

**Í Vesturheiminum eru fá lond, sum hava greiðan skilnað millum stat og kirkju. USA hevur størstan skilnað, og Svøríki hevur somuleiðis eina privata kirkju.**

**Frakland hevur á pappírinum tað sama, men katólska kirkjan hevur fíggjarligar fyrimunir í samfelagnum. Tað eru eisini nøkur heilt fá afturat, sum hava okkurt slag av skilnaði millum stat og kirkju.**

**Men hóast statur og kirkja eru atskild, so merkir tað ikki neyðturviliga, at kirkjan fær minni vald.**

**Í USA hevur religiónin nógv vald, og í Damnark hevur kirkjan lítið og onki vald, hóast hon er statskirkja.**

**Í kjakinum í Danmark í løtuni verður ført fram, at kirkjan í Svøríki er byrjað at úttala seg um politisk viðurskifti, síðan hon varð privatiserað í ár 2000.**

**Hinvegin eru eisini dømi um lond, har kirkjan hevur nógv vald, hóast hon er partur av statinum. Italia er sterkasta dømið við Vatikaninum.**

**-eij**

# Fólkaflokkurin tekur frástøðu frá HUXA

**Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, tekur frástøðu frá útsagnunum hjá HUXA og metir, at tað eru einkultpersónar, sum ikki hava hugsað seg nóg væl um**

FÓLKAKIRKJA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hatta er ikki nakað Fólkaflokkurin tekur undir við. Føroyska samfelagið er bygt á eitt kristið grundarlag, og kirkjan ger uppgávur fyri landið, sum helst høvdu blivið dýrari, um tú legði tað út á ein vanligan almennan stovn.

So greiður er Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum.

Hann vísir á, at kirkjan tekur sær av skrásetingini av føroyingum, og soleiðis hevur verið í øgiliga langa tíð.

– Kirkjan hevur loyst tað uppgávuna væl, og tí skal hon hava pening úr landskassanum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann leggur afturat, at hugsanin, sum HUXA er komin við, helst byggir á, at einstakir limir í ungmannafelagnum, hava verið á stevnu hjá Konservativ Ungdom og ikki hava hugsað seg nóg væl um, áðrenn tey hava úttalað seg um kirkjuna.

### Stuðla hinum samkomunum

Jørgen Niclasen sigur somuleiðis, at Fólkaflokkurin fegin vil vera við til, at geva øðrum samkomum fyrimunir.

– Eitt uppskot liggur at frítaka felagsskapir MVG, tá teir byggja. Samkomur eru ikki tiknir við har, men Fólkaflokkurin fer at mæla til, at samkomur koma við, sum allir aðrir frítíðarfelagsskapir, sigur Jørgen Niclasen.

Hann staðfestir tó, at sjálvandi skulu fólk velja ta trúgv, sum tey hava hug til, og tað skal landið ikki blanda seg uppí, men fólkakirkjan loysir nakrar konkretar uppgávur fyri statin.